# VARPIÐ



SvF • Leygardag 12. kl. 16.00

**»DR2 Tema: Ísrael«**

Staturin Ísrael hevur nú verið á landkortinum í 60 ár. Og nógv er hent gjøgnum tey 60 árini. Hava ísraelsmenn orsøkir til at vinda flaggið á stong? Hevur staturin gott støði at standa á? Og hvørjar vónir hava ísraelsmenn til komandi ár? Adam Holm og DR2 Tema eru farin til tað umstrídda og nógv virda landið fyri at tosa við mentafólk og samfelagskjakarar.



SvF • Týsdag 15. kl. 21.05

**»Vánaligt dannisli«**

Ungi filmsleikstjórin Enrique hittir aftur gamla skúlavinin Igancio. Ignacio hevur skrivað eina stuttsøgu um teirra tíð á einum strongum katólskum kostskúla, har kærleikin spretti millum teir ungu dreingirnar, men har eisini presturin Manolo forelskaði seg í Ignacio. Virðisl. spanskur filmur frá 2004



SvF • Mánadag 14. kl. 20.00

**»Søgan um kaffið 1:3«**

Søgan um kaffið byrjar við tí grønu bønuni innan í tí reyða berini á kaffitrænum. Fólk í Etiopia vóru fyrst at savna ber og bløð av tí villa kaffitrænum. Tey tugdu bløðini ella ótu tær knústu bønirnar blandaðar upp í feitt fyri at orka betur.

Sosialurin

TELEVARPIÐ

**Fríggjadagur 11. juli 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**